Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Nýggja Norröna

## *Oddagrein*

DAGURIN í gjár fer at standa sum ein av varðunum í føroyskari ferðavinnusøgu. Tá undirskrivaðu umboð fyri Smyril Line og týska skipasmiðju avtalu um bygging av nýggjari Norrönu. Hóast talan er um eina stóra upphædd fyri eitt slíkt skip, so er kortini greitt, at hetta uttan iva er ein røtt avgerð. Føroyar liggja soleiðis fyri geografiskt, at tað altíð vil vera tørvur á góðum sjóvegis sambandi við umheimin.

AT vit so eisini liggja so heppið fyri at vera á hálvari leið millum Ísland og meginlandið er nakað, sum eigur at koma okkum til góðar, og verður hesin strategiski fyrimunurin eisini fult troyttur, nú Smyril Line hevur gjørt av at byggja eitt spildurnýtt skip til at sigla í Norðuratlantshavi.

SOLEINGI tú er einsamallur at røkja slíka farleið, hevur tú eisini skyldur mótvegis teimum ferðandi og brúkaranum sum heild. Síðani DFDS gavst at sigla hevur Smyril Line verið einsamalt í hesi sigling, og nú fyritøkan fer undir eina so stóra nýggja íløgu tryggjar hon sær eftir øllum at døma eisini at vera einsamøll á hesi rutu í framtíðini. Nú kann ein siga, at tað hevði verið betri við kapping, men til tað er at siga, at skuldu tvey skip røkt siglingina, hevði neyvan nakað av teimum borið seg. Hinvegin vil Smyril Line framhaldandi fáa kapping frá loftferðsluni.

TAÐ er eisini gott og hugaligt at vita, at vit nú fáa eitt skip, sum fer at lúka øll krøv til trygdina á havinum. Hóast Norröna lýkur hesi krøv í dag, so fer tann dagur at koma, tá skipið ikki ger tað longur. Vit mugu so eisini hugsa um, at Norröna er heldur ikki gjørd til okkara farvatn. Nýggja skipið verður skræddaraseymað til siglingina, onkur skal hava tikið til, at hon er eitt sætt Hammer-design. Stjórin í fyritøkuni ÓLi Hammer kennur hesa sigling betri enn nakar, tí hann hevur bæði verið á brúnni á sjónum og á landi. Tí mugu vit seta okkara álit á, at hann saman við øðrum góðum fólkum hevur megnað at fáa tað rætta skipið til siglingina.

NÚ tað verður tosað um at fáa búskapinum fleiri bein at standa á, hevur eisini verið víst til ferðavinnuna sum eitt teirra. Og við nýggja skipinum ger Smyril Line sítt til at liva upp til henda setning.

TAÐ skal vera okkara vón, at hetta tiltakið fer at eydnast væl og ynskja vit Smyril Line og annars øllum føroyingum góða eydnu við nýggju Norrönu.

*Sosialurin*

## Viðmerking:

# Lygnir og óndskap sum livibreyð

*Við hesum verður sipað til blaðstjóran á Oyggjatíðindum, sum livir av at gera øðrum ilt og knúsa familjur sundur, alt í navni etiska journalistiksins*

Rætt er tað, at føroyski blaðheimurin hevur stóran tørv á einum uppruddandi blað, sum ger eitt djúptborandi journalistiskt arbeiði fyri at fáa sannleikan fram. Men ikki er tað slíkt, Dan Klein í áravís hevur gjørt á Oyggjatíðindum. Hann hevur á ótrúliga óndskapsfullan hátt sorlað familjur sundur og gjørt mongum ilt. Hann skrivar til ein ófatuliga óvitandi lesaraskara, sum finnur fragd í at válka sær í hesi óndsinnaðu og lygusomu skriving.

Í mong Harrans ár hevur hesin Dan Klein púra sjúkliga lagt eftir Blákrossheiminum og Bláa Krossi Føroya. Hví, veit eg ikki. Paranoia? Kanska. Í øllum førum reindyrkaður óndskapur móti einum stovni og einum landsfelagsskapi sum virk aá kristiligum støði.

Her verður serliga sipað til grova lyguálopið, sum fylti stóran part av Oyggjatíðindum 14. juni í ár. Eitt álop á so skitnum støði, at blaðstjórin átti at verið koyrdur í Føroya Blaðmannafelag.

Møguliga er tað skeivt av mær at skriva hesar reglur, tí at royna at broyta eina stinkandi kloakk, sum Oyggjatíðindi, er til ónýtis. Kortini fái eg meg ikki at tiga.

Sjálvur havi eg starvast á Blákrossheiminum síðani 1988, so eg kenni alt til mannagongdina har. Har er avgjørt einki, sum ikki tolir dagsins ljós.

Hvat roknskapi okkara viðvíkur, so hevur roknskapurin ongantíð fingið nakra viðmerking, hvørki frá grannskoðarafelagnum ella frá Føroya Landsstýri. Og seinasti roknskapur varð umtalaður sum ruddiligasti roknskapur, grannskoðarafelagið hevði sæð. Slíka umtalu fær ikki ein og hvør stovnur.

Tí er tað meira enn syrgiligt, at Dan Klein hevur funnið sær eina sonevnda »keldu«. Syrgiligt, tí at viðkomandi »kelda« er ein sjúkur persónur. Eg havi sæð ákærur hansara til landsstýrið. Tær eru púra burtur úr vón og viti. Men tað álvarsligasta er tað, at tað er púra greitt, at sonevndu »upplýsingarnar« hevur hann frá starvsfólki/fólkum, sum hava brotið tagnarskyldina og ført pennin hjá hesum sjúka persóni. Brot á tagnarskylduna er sera álvarsligt mál, sum eigur at fáa fylgjur.



Tó, einum hevur »keldan« rætt í. Summi búfólk ella fólk í eftirviðgerð hava helst fingið betri sømdir enn onnur og »Keldan« hjá Dan Klein er helst tann, sum hevur fingið allarbestu sømdir. »Ger Skálkinum gott, hann lønar tær aftur við háð og spott«.

Fyri at eingin misskiljing skal koma í, vil eg leggja dent á, at hesar reglur eru skrivaðar av mær sjálvum, og eg taki alla ábyrgdina. Blákrossheimið hevur einki sum helst við hetta at gera. Eg eri so vanur við at fáa lortabyttur í bløðunum, eg taki tað sum ein heiður, um Dan kemur við eini byttu meira ella minni eftir mær. Eg eri púra immunur. Men rokna ikki við, at eg tími at svara. Og læt so Blákrossheimið og Bláa Korss Føroya fáa frið til at arbeiða við fólki, sum treingja til hjálp. Skuldi blaðstjórin á Oyggjatíðindum trongt til hjálp onkuntíð, skal hann vera vælkomin á Blákrossheimið.

**Tórshavn 21.06.2000**
**Arnbjørn R. Thomsen**

# Valdið hjá Tórbirni Jacobsen

Leygardagin hin 10. juni skrivar Tórbjørn Jacobsen um eitt politiskt og búskaparligt kaos, sum verður, um Tjóðveldisflokkurin missir sítt núverandi vald.

Tórbjørn Jacobsen, sum annars dugir væl at tosa og skriva, ger hesaferð, av politiskum áðum, eina skeiva niðurstøðu. Hann ger fleiri mistøk, sum eg her skal rætta:

**Vilja hava broytingar**
Fyri tað fyrsta, so vil Sambandsflokkurin so avgjørt hava broytingar. Okkara flokkur vil við Nýskipanaruppskotinum júst hava fleiri grundleggjandi broytingar í núverandi skipan millum Føroyar og Danmark.

Harnæst er eingin grundleggjandi munur millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin tá talan er um tann ríkisrættarliga spurningin, hóast flokkarnir, sum vera man, eru tveir ymiskir flokkar, (um enn ikki líka ymiskir sum Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin eru). Hetta veit Tórbjørn um hann hevur fylgt við tí politiska kjakinum tvey tey seinastu árini.

Men eg kann kortini hjálpa Tórbirni við at nevna nøkur øki, har semja valdar flokkana millum á tí ríkisrættarliga økinum:

1. Báðir flokkarnir ynskja eina nýggja skipan.
2. Flokkarnir ynskja eina loysn innanfyri ríkisfelagsskapin.
3. Flokkarnir ynskja eina skipan, sum greitt gevur



Føroya Løgtingi evsta vald í yvirtiknum málum.
4. Flokkarnir eru samdir um, at ongar forðingar skulu vera fyri, hvørji mál kunnu verða yvirtikin.
5. Flokkarnir eru púra samdir um, at tíðin er búgvin til broytingar.
6. Somuleiðis eru flokkarnir púra samdir um, at nýggja skipanin í ríkisfelagsskapinum við Danmark og Grønland skal geva okkum møguleikar fyri reellum- og ikki bert formellum sjálvstýri í Føroyum. Eitt sjálvstýri, sum verður ment og útbygt í mun til okkara egnu umsitingarligu og fíggjarligu førleikar.
7. Flokkarnir eru samdir um, at teir hava eitt gott og greitt alternativ til loysing og fullveldi.
8. Flokkarnir viðurkenna, at ríkisstuðulin enn er ein týðandi partur av grundarlagnum undir okkara vælferðarskipan, men at arbeiðast skal framhaldandi ímóti búskaparligum sjálvbjargni, har vælferðin verður varðveitt og ment.

Mugu hava breitt samstarv Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fáa valla einsamallir alt valdið, eftir at Tjóðveldisflokkurin hevur rent seg fastan. Tað er tískil burturvið hjá Tórbirni bert at tosa um tveir flokkar, og serstakliga tá talan er um at gera sera tíðandi broytingar í verandi ríkisfelagsskapi.

Vit eru ikki, eins og Tjóðveldisflokkurin, nøgd við ein tepran meiriluta uppá 50,01%. Vit vilja heldur hava eina skipan, sum flest allir føroyingar kunnu taka undir við.

**Fullveldi er kaos**
Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin vilja ikki keypa eitt fullveldi, sum setir okkara ognir í veð. Slíkt ábyrgdarloysi vil føra til politiskt og búskaparligt kaos í Føroyum.

**Breitt valdsbýti**
Tórbjørn Jacobsen skrivar at Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen umboða ábyrgdarloysi, og at hesir menn kunnu ikki samstarva, og tí er vandamikið at geva teimum valdið.

Ein sera løgin niðurstøða hjá Tórbirni, sum júst er farin úr eini samgongu, sum hevur sett met í innanhýsis klandri og met í vantandi støðutakan, alt

Tað einasta sum verandi samgonga er samd um, er at skipa Føroyar sum fullveldi, langt áðrenn tíðin er búgvin til tess.

Tórbjørn Jacobsen veit, at vit ikki gera eins og í Tjóðveldisflokkinum, og tískil verður alt valdið ikki givið bert til tveir góðar tinglimir, men til í minsta lagi 21 góð løgtingsumboð, sum skulu endurnýggja viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

**Føroyingar fáa størri vald**
Nei Tórbjørn. Vit skulu ikki hava eina skipan, sum ger at Føroyar skulu vera undir donskum valdi. Vit skulu ístaðin hava eina skipan, sum skal styrkja okkara sjálvbjargni og geva okkum meira sjálvstýri, og tað eru Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin samdir um.

Tórbjørn hevur sostatt ikki fyri neyðini at vera so stúrin. Fáa Edmund og Jóannes valdið, ja so fær Tórbjørn eisini størri vald, um hann aftur tá verður løgtingslimur.

**Tjóðveldisflokkurin - forðan fyri broytingum**
Nú allar royndir um loysing eru miseydnaðar, átti Tór bjørn at mælt sínum flokki til at flutt seg, soleiðis at løgmaður kundi umskipa verandi samgongu, og harvið tikið burtur allar trupulleikar um blokk, skiftistíð, rættindi og møguleikar.

Fekk løgmaður tann møguleikan, ja so fingu vit eisini eina skipan, sum fólkið vil hava. Ein slík skipan vil ikki forða fyri, at føroyingar einaferð í framtíðini taka fullveldi um umstøður tá eru til tess.

**20. juni 2000**
**Trygvi F. Guttesen**



# Teir skriva søgu

*Ongantíð áður er privat felag farið í gongd við slíka stóra verkætlan. Tískil var tað søguligt, tá Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, og Fred Garbe, skipasmiðjustjóri, undirskrivaðu endaligan byggisáttmála*



*Fred Garbe, skipasmiðjustjóri og Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, hava undirskrivað sáttmálan til nýggja flaggskip føroyinga (Mynd: Jens K. Vang)*

DIA MIDJORD

Óli Hammer skal djúpt niður í lumman, tá hann skal rinda tær 660 milliónirnar, ið nýggja Norröna kostar. Men fyri pengarnar fær hann so eisini eitt spildurnýtt ferðamannaskip, ið hevur bæði svimjihyl, gosbað, sauna, solarinum og hvat tað nú skal vera.

Endaligi byggisáttmálin, har fíggingin eisini er fingin upp á pláss, varð undirskrivaður á Hotel Føroyum í gjár. Tað er týski bankin KFV í Frankfurth, ið hevur útvega Óla Hammer og Smyril Line fígging. Fíggingin er í evru-gjaldoyranum, og upphæddin er 88 milliónir evrur.

Arbeiðið upp á nýggju Norrönu, ið skal latast Smyril Line 31. mars 2002, byrjaði 1. mars í ár.

**Skriva søgu**
Óli Hammer og Smyril Line hava uttan iva skrivað sær egnan kapittul í føroyskum søgubókum.

Eitt er, at nýggja Norröna er størsta og dýrasta skip, ið føroyingar nakrantíð hava keypt. Eitt annað er, at hetta er størsta verkætlan, ið nakað privat felag er farið í holt við.

Og tað er spurningurin, um ikki Óli Hammer við at seta endaligu undirskrivt sína á byggisáttmálan í gjár, er farin í holt við størstu verkætlanina nakrantíð í Føroya søgu.

Sum onkur tók til í gjár. Undirsjóvartunnlar eru peanuts í hesum sambandi.

**Væl nøgdir**
Fred Garbe, stjóri á skipasmiðjuni í Flensburg, lovaði Óla Hammer og teimum hjástaddu, at Smyril Line skuldi fáa eina ferju, sum var avbera væl úr hondum greidd.

– Henda løtan er eisini ein stór løta fyri okkum. Vit hava í níggju mánaðir arbeitt saman við Óla Hammer, fyri at koma fram til hesa okkara endaligu loysn, segði Fred Garbe.

Flensburger Schiffbau-Gesellschaft hevur ikki bygt eina slíka ferju áður, men hevur royndir við nærum øllum øðrum skipum.

Nýggja Norröna er nýbygningur nr. 710 á hesi týsku skipasmiðju, ið eisini hevur bygt gomlu Norrönu.

Δ

# Mugu hava nógv fleiri ferðafólk

*– Vit hava sett nøsina upp eftir eini 30.000 fleiri ferðandi um árið, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line*

DIA MIDJORD

Skal Norröna bera seg, mugu 30.000 fólk aftrat ferðast árliga við skipinum. Seinasta ár ferðaðust á leið 70.000 ferðafólk við skipinum, men hetta talið skal skjótast gjørligt leggja seg nærri 100 túsund ferðafólkum.

**Luksus-skip**
Og tað verður kanska ikki so torført at økja um ferðafólkatalið, tí nýggja skipið bjóðar ferðandi avbera góðar umstøður. Øll kømrini hava WC/bað og sjónvarp. Fleiri av kømrunum hava køliskáp, hárturkara og eitt nú buksupressu.

Nýggja Norröna, ið kostar Smyri Line 660 milliónir, skal eftir ætlan latast 31. mars 2002. Skipið kann taka 1600 ferðafólk og einar 1000 bilar. Roynt verður til tá at selja hesa Norrönu.

– Vit vilja hava einar 80 milliónir fyri hetta skipið, sigur stjórin á Smyril Line.

Nýggja Norröna skal alt árið sigla til Føroya og talan verður um somu ferðaætlan.

– Vit hava roynt ymsar aðrar leiðir, eitt nú Aberdeen, men tað tykist torført at fáa bretar at ferðast hendavegin. Tað endar altíð við, at vit koma aftur til ferðaætlanina, sum er í dag, sigur Óli Hammer.

**Pylsur á sóldekkinum**
Nýggja Norröna hevur nógv meiri pláss og kann bjóða ferðandi allar hentleikar.

Í blaðnum í morgin fara vit at gjøgnumganga skipið nærri, men kunnu longu her avdúka, at tú ikki longur noyðist fara av sóldekkinum fyri at keypa tær eina kalda øl ella eina stokta. Hetta verður til keyps á sjálvum sóldekkinum.




*Nýggja flaggskip føroyinga á veg gjøgnum Kalsoyarfjør (tilgjørd mynd)*

team 85 · 31 65 11

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
úr einans ...
(í lágárstíð)
864,-
fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
úr einans ...
(í lágárstíð)
691,-
fyri hvønn



Privat gisting
úr einans ...
(í lágárstíð)
819,-
fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo